Føroya
SOSIAL-DEMOKRATUR

Blaðstjóri
VILLI SØRENSEN
telf. 2172
Postbox 76

Prent:
A. ØSTER

390 kr.

Orsakað av afturhaldsins niðurgongu- og drápspolitikki móti fiskimonnum var lönarviðbót teirra komin niður í 390 kr. um mánaðin. Hóast henda dapra veruleika ætlaðu teir heilt at avtaka lönjavningargrunnin. At veita fiskimonnum henda stuðul vildu teir stóru harrar ikki; men samstundis stóð ikki á hjá teimum at útvega 12 milj. kr. til Sjóvinnubankan, men har vóru tað Th. Petersen, Chr. H. Jacobsen og aðrir stórir harrar, ið skuldi bjargast.

Uppskot jjavnaðarmanna var al tíð 700 kr. um mánaðin í lönarviðbót.

Fiskimenn hava ikki ilt við at skilja munin.

Eftir er bert at reka hetta kolsvarta afturhaldið úr öllum álitissessum her á landi.

Tað gerst við at fylkjast um JAVNAÐARFLOKKIN hin 8. nov

Tollurin á TUBBAK til fiskimenn.

Tað eru nú mong ár síðan javnaðarmenn á fyrsta sinni reistu málið um, at okkara langfarafiski menn skuldu fáa tollfrítt tubbak eins og langfaramenn í öðrum londum, men á hvörjum einasta sinni hevur málið verið felt av fólkaflokkinum og sambandsflokkinum.

So stór er virðing teirra fyri okkara sjómonnum.

Nú stendur tað til fiskimenn at fella teir hin 8. nov.

Avtøka Vinnulánsgrunnsins.

Í mars mánaði 1952 samtykti samgonguflokkarnir at avtaka *Vinnulánsgrunnin* og leggja hann undir landsstýrið. Mótmælisflokkarnir mótmæltu. Einki bataði. Minni-maðurin skuldi onga verju eiga, og allir kenna í dag, hvussu ovurgrammir teir hava verið at selt skip fiskimanna; men teir hava ikki bert mist skipini, eisini allan peningin, ja nógvir bæði hús tröð og annað.

Teir, sum ongan pening vágaðu, tá ið tey nógvu skipini vórðu keypt, standa nú við opnum örmum og lofta fiskimannaskipunum fyri lítið og lætt.

Ongatíð hevur leikað so hart á at fáa JAVNAÐARMENN til ræðið sum í dag.

Dagblaðið um okkum.

2. apríl 1953 skrivaði »Dagblaðið« hesi orð um P. M. Dam og Javnaðarflokkin.

»*Annars skal henda grein verða eitt prógv frá Dam, at javnaðarmenn eru »positivari« enn tjóðveldismenn*«

Og víðari:

»Eisini vit vilja ásanna, at javnaðarmenn hava meira praktiskt arbeiði at vísa á enn tjóðveldismenn.....«

Landinum tørvar ein nýggjan politik.

HVÍ IKKI UMSKIPA LÆKNA- OG HEILSUVIÐURSKIFTINI?

Nú er stundin at taka til umhugsingar eina umskipan av lækna og heilsubótarspurninginum fyri allar Föroyar.

Hví ikki kvetta við alt sum er og byrja heilt av nýggjum:

Læknarnir verða settir sum tænastumenn landsins fyri eina hampuliga lön soleiðis, at tey smáu læknadömini fáa líka góð líkindi til góðan lækna sum tey störru.

,Fyri hesa lön eiga teir at geva okkum góða heilsu ókeypis.

Somuleiðis eiga öll at fáa ókeypis »medisin« og annað, ið er fyri neyðini at tryggja heilsuna við.

Við eini tílíkari umskipan verða vit at fáa ein lætta, ið er so munandi, at vit ætlandi kunnu byggja eitt heilt skip um árið.

SOSIALISTISKA ALHEIMSMANIFESTIÐ 1951.

Sosialistarnir arbeiða fyri friði og tryggleika í heiminum, fyri einum heimi, har menniskjans eydræning og trældómur av öðrum menniskjum er bannað, fyri einum heimi, har fræls virksemi hina einstöku menniskjuna er grundarlagið fyri frælsu menning mannaættarinnar.

Órættvísi.

Fiskimenn fáa oftani ikki avrokningina rættstundis. Ímeðan forfellur lögtingsskatturin til gjald ingar. Teir vilja fegin gjalda; men hava ikki fingið peningin, ið goldið skal verða við.

So verður renta í dýrum dómum lögd aftrat lögtingsskattinum.

Eitt rúkandi órættvísi!!

Longu í 1953 hövdu javnaðarmenn uppskot um

at renta ikki skuldi kunna voknast av til gjaldingar forfallnum lögtingsskatti hjá fiskimonnum.

Hetta uppskot feldu sambandið og fólkaflokkurin.

FISKIMENN FELLIÐ *TEIR* NÚ!

Foderstoffer.

Foderblanding, Hvedeklid, malet Byg, Hönsefoder »Record«, hel Byg, hel Hvede, hel Havrn, hel Dari
STÖRSTE LAGER BILLIGSTE PRISER
A.S. VALDEMAR LÜTZEN,
THORSHAVN.

KAFFI!

Nú kunnu vit bjóða øllum fólki í Føroyum gott kaffi. Vit hava okkara egna kaffibrennarí, somuleiðis hava vit eina nútímans kaffimyllu, sum goymir bönirnar væl. Kaffi verður malið beinleiðis í kaffiposarnar, meðan tit bíða.

Í løtuni hava vit trý góð sløg av kaffi.

JAVA BLANDING
BRAZIL BLANDING
SANTOS SPESIALBLANDING

Kaffi er fallið nakað í prísi og ur útlit fyri at tað fellur enn meira.

„Smæran"
Tlf. 147 - 148

P.F. FØROYA BANKI
(Stovnaður 1906)

Høvuðsskrivstova: TÓRSHAVN Tlf. 1350
Suðuroyar deild.. TRONGISVAGI Tlf. 32

Renta av innskoti við uppsögn uppá 3 mánaðar 4 % p. a.
Renta av bankabók 3½ % p. a.

Bankin er opin 10—12 og 14—16 — Leygardag 10—14
Suðuroyar deild opin kl. 10—12 og 13—15.
Leygardag - - 10—12 og 13—14.

Skipafelagið Føroyar
Telefon 1225
Tórshavn

Føroya Bjór
ØL- og MINERALVATNSVIRKI

Máltráð 4
FÖROYA PILSNAR
EKTA MALTØL

Citrón sodavatn
Appelsin limonada
Hindber limonada
Jarðber limonada
Vanillie limonada
Appolinaris

EINAR WAAG, *Klakksvík*

VELJIÐ LISTA C!